BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi til barnaøkið o.a.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið søkir eftir dugnaligum og ágrýtnum fulltrúa, at byrja skjótast til ber. Fulltrúin kemur at arbeiða á Fakdeildini við barnaøkinum sum høvuðsumráði.

Uppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- Lóggávumenning – at taka lut í fyrireikingini at endurskoða lóggávu og regluverk á dagstovnaøkinum. Umframt onnur lóggávumenning innan økið
- At veita leiðslu og starvsfólkum í ráðnum ráðgeving og vegleiðing
- At taka lut í verkætlanum, her ímillum eisini vera standa fyri og røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur
- At viðgera kærur í samráð við aðrar partar í ráðnum
- At umboða ráðið í tvørgangandi samstarvi

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdir eru í samsvari við nútímans krøv.

Høvuðsuppgávan í einum stjórnarráðið er politisk menning og umsiting, sum er at veita tænastur til landsstýrisfólkið og tryggja, at málsøkið sum heild verður umsitið á fullgóðan hátt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni, vera skipað/ur og duga væl at orða seg á føroyskum og donskum, bæði í skrift og talu. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjari hevur royndir frá fyrisiting innan barnaøkið.

Tú skalt vera tænastusinnað/ur, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni. Tú skalt hava førleika skjótt at seta teg inn í nýggj viðurskifti og duga at miðla hetta víðari til onnur. Eisini mást tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti. Tú skalt hava góð analytisk evni umframt politiskt tev og áhuga fyri barnaøkinum og samfelagsviðurskiftum í síni heild.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært avvarðandi sáttmála. Setanarøkið fevnir um øll stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum skal sendast til:

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
J.H. Schrøtersgøta 7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við telduposti til: bumr@bumr.fo

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 23. februar 2024**. Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Elsu Østergaard, deildarstjóra, á tlf. 555004 ella t-post Elsao@bumr.fo.

***Barna- og útbúgvingarmálaráðið** fyrisitur høvuðsmálsøkini barnavernd, barnaheilsu, dagstovnaøkið, útbúgving og gransking. Sí heimasíðu ráðsins www.bumr.fo*